## Hava søkt um farloyvi

Havn: Býráðslimirnir Katrin Dahl Jakobsen og Annika Olsen hava søkt um farloyvi frá býráðsarbeiðinum, tað, sum eftir er av býráðssetuni, skrivar heimasíðan hjá Tórshavnar kommunu. Orsøkin til umsóknirnar er, at tær báðar vórðu valdar í Løgtingið á valinum tann 19. januar. Katrin Dahl Jacobsen umboðar Javnaðarflokkin í býráði og Løgtingi, og Annika Olsen umboðar Fólkaflokkin. Á býráðsfundi hóskvøldið fer Tórshavnar býráð at taka støðu til umsóknirnar. Varalimirnir, ið koma í býráðið, um umsóknirnar verða játtaðar, eru eisini kvinnur. Fyri Katrina Dahl Jakobsen er Halla Samuelsen varalimur, og fyri Anniku Olsen er Inga Dahl varalimur. Tær hava báðar fyrr havt sæti í býráðnum sum varalimir.



## Juliane við turriklæði

Grønlendski fólkatingslimurin Juliane Henningsen fer at hava turriklæði á høvdinum, tá hon í næsta mánað fer til Iran saman við hinum limunum í uttanríkispolitisku nevndini hjá Fólkatinginum. Juliane Henningsen sigur við KNR, at danski sendiharrin í Iran hevur mælt kvinnunum í nevndini til at lata seg sømiliga í, sum hon tekur til. Ferðin til Iran er ein kunningarferð, og nevndin skal hitta iranskar politikarar umframt danska sendiharran í Teheran.

# aksvíkar



*Sambært øllum sólarmerkjum gongur ikki long tíð, til annað skip kemur í flotan fyri Atlantic Navigator*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

flytast yvir á møgulig ídnaðarskip.

Hóast fleiri royndir eru gjørdar at finna út av hesum, er spurningurin ongantíð veruliga svaraður.

Eitt sjónarmið hevur verið, at landsins myndugleikar kunnu ikki áleggja skipum framleiðsluskyldu, um lønandi vinnan ikki fæst burtur úr hesum.

### Skiparin bíðar

Sosialurin hevur eisini vent sær til Brand Nólsoy, sum var annar av føstu skiparunum við Atlantic Navigator.

Vit spurdu, um hann hevur fingið kjans við einum møguligum »voyager« við Hanusi Hansen sum reiðara.

Brandur sigur, at hann hevur verið heima, síðan hann var seinasta túrin við Atlantic Navigator hin 6. juli.

- Eg skal ikki dylja yvir, at eg havi bíðað og havi vónað, at okkurt fór at spyrjast burtur úr einum øðrum skipi, men eg havi onga viðmerking til ítøkiliga spurningin, um eg havi fingið kjans við einum øðrum skipi hjá felagnum ella ikki.

Brandur Nólsoy sigur, at tað er Hanus Hansen, reiðari, sum úttalar seg vegna felagið, og tað er í fyrsta lagi hann, sum arbeiðir við málinum um annað skip.



*Nú Fjalshamar og Smaragd eru úr vinnu vegna ymiskar umvælingar og ábøtur, partrola Safir og Nónhamar. Teir landaðu 210.000 pund í Klaksvík fríggjadagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Trolarar til umvælingar

**Í longri tíð hava trolararnir Smaragd og Fjalshamar verið til umvælingar, og meðan bíðað verður eftir skipunum, eru Safir og Nónhamar farnir at partrola**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjadagin landaðu ísfiskatrolararnir Safir og Smaragd á Kósini í Klaksvík. Skipini høvdu umleið 180 kør í part, og soleiðis vá samlaða veiðan umleið 210.000 pund, meginparturin upsi.

Safir og Nónhamar partrola ikki vanliga, men tað gera teir, nú báðir makkararnir hjá teimum eru til ymiskar umvælingar og ábøtur.

Fjalshamar, sum vanliga partrolar saman við Nónhamri, hevur seinastu tíðina staðið á beding í Klaksvík, har skipið eitt nú hevur fingið aksiltrekk.

Smaragd, sum partorlarar saman við Safir, hevur eisini verið úr vinnu síðan fyri jólahalguna vegna ymiskar umvælingar og broytingar, eitt nú á dekkinum.

### Turt gólv

Á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík var einki at gera í morgun, og tey hava heldur onga fráboðan fingið um landing teir næstu dagarnar.

- Tað einasta, vit higartil hava fingið at vita, er, at línuskipini Helena og Kvikk hava boðað frá landing mánadagin í næstu viku.

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, at útlit tískil eru til eina slaka viku hjá landarunum í Klaksvík.

- Enn er ov tíðliga at siga, um okkurt kortini verður, sum vit enn ikki vita um, men hugsandi er, at hetta verður ein lítil vika, sigur landingarformaðurin.

## Landaðu á Beta í nátt

**Á Landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará landaðu teir partrolararnar Polarhav og Stjørnuna síðstu nátt, tí skipini skuldu á beding í Havn tíðliga í morgun**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leirvíkstrolararnir høvdu sløk 300.000 pund tilsamans, nú teir løgdu veiðina upp í Saltangará síðstu nátt.

- Vit landaðu skipini í nátt, tí tey skuldu vera á Tórshavnar Skipasmiðju longu klokkan 07 í morgun, siga tey í Saltangará.

Sum skilst, skal okkurt gerast í sambandi við vatngerarnar umborð á skipunum.

Hvussu hendan vikan annars kemur at roynast á landingarmiðstøðini, var ikki heilt greitt, tá ið vit frættu í morgun.

Ísfiskatrolararnir Edna, fyrrverandi Vesturvarði, sum Faroe Seafood eigur lut í, landar eini 150.000 pund í Saltangará í morgin, og á landingarmiðstøðini vænta tey eisini, at Rókur og Lerkur og Bakur og Stelkur koma inn at landa seinni í hesi vikuni.

- Vit vænta, at hesi fýra skipini koma inn at landa hósdagin ella fríggjadagin, siga tey á Beta.